100 ára gomul slupp úr Hetlandi vitjar á ólavsøku

Í juni 1996 sigldi Swan fyri fyrstu fer› aftur vi› seglum, eftir at hon var umvæld



Swan sokkin í havnini í Hartpool

Stásiliga slupp hetlendinga – 100 ára gamli Svanurin, LK 243, kemur til Føroya á ólavsøku. Bert spell, at føroyingar onga slupp hava longur. Johanna er langtí›arleiga› til Danmarkar, og Wesstvard Ho liggur sum ein skomm á Havnarvág

Í morgin, 27. juli, kemur Svanurin úr Lerwick til Føroya. Skipari á túrinum ver›ur Andrew Halcrow, og saman vi› honum ver›a tey 15 fólk. Sluppin, Swan, fer úr aftur Føroyum sunnudagin 30. juli.

Í 1899 lótu Hay & Co, rokskiparin Thomas Isbister, saman vi› vinmanninum William Watt byggja 67 fót langa sildabátin, Swan, í Lerwick. Í mai 1900 var skipi› handa› eigarunum. Væl av sild var hesi árini, og í 1913 var Swan besti bátur og seldi fyri 711 pund (um 8.000 krónur) hetta summari›.

Í september 1935 var Swan ein av fimm seglbátum, i› ikki høvdu motor í Hetlandi. Hann skifti eigarar nakrar fer›ir. Men í 1989 lá Swan sokkin í havnini í Hartpool.

Ein lokalur handilsma›ur, Mr. Parkers, fór í holt vi› at bjarga hesum klassiska skipi. Henda ætlan var› honum alt ov d‡r, so frábo›a›a vitjanin til Hetlandsoyggjarnar vi› Svaninum 28. september 1990 var› av ongum. Hann bjó›a›i hetlendingum at keypa skipi› fyri ta›, skipi› hev›i kosta› honum. Í Hetlandi var stórur áhugi fyri teimum gomlu seglskipunum. Mær er fortalt, at føroysku sluppirnar birtu uppundir á hjá hetlendingum at finna hóskandi skip at seta í stand. Einki skip var eftir í Hetlandi. Leita› var› eisini í Føroyum.

Tá so møguleikin var at ogna sær skip, i› var bygt í Lerwick, var hetta sí›sta útkall, hóast skipi› var í sera ringum standi. The Swan Trust var› stovna› vi› James Moncrief, sum formanni. Hann var forma›ur í hetlendska alarafelagnum. Ein grunnur var gjørdur, har vinnulív› og áhugafeløg vóru vi›. Savna› vór›u á henda hátt 1,6 mill, i› mett var›, at keyp og umvæling av skipinum fór at kosta.

9. apríl 1991 sigldi Svanurin eftir 30 árum aftur til Lerwick, har hann fekk eina umvæling, i› minir um hana, Johanna fekk.

Í juni 1996 sigldi Svanurin aftur vi› seglum. Kostna›urin at umvæla Svanin var› ikki 1,6 mill, sum mett av fyrstan tí›, men 3 milliónir. Men neyvan er nakar, i› vildi veri› hann fyri uttan í dag. Vanliga siglir hann vi› fer›afólki kring oyggjarnar, og er javnan uttanlands til stevnur.

Nú kemur hann so til Føroya í sambandi vi› ólavsøkuna, har hetlendskar bátsmanningar fara at rógva. Svanurin fer at liggja uttan á Thorshavn í Vágsbotni á ólavsøku. Manning og skip skula ver›a hjartaliga vælkomin.

Spell at vit onga slupp hava at fara vi› út í Nólsoyarfjør› at taka ímóti. Westvard Ho liggur sum ein skomm fyri Havnar b‡, og Johanna er send í útlegd, hóast ta› á uppslag umbor› stendur, at skipi› er eitt fornminni. Vit hava í Føroyum eftir øllum at døma ikki rá› at halda hesi skip.

Nú føroysku sluppirnar eru givnar at sigla í Føroyum, eru ta› tey, i› fegnast, nú hetlendingar koma hendanvegin at seta dám á ólavsøkuna vi› Svaninum. Kanska ver›a ta› føroyingar, sum hesfer› fáa naka› at hugsa um, á›renn ov seint er

Jens Reinert

Stásiliga sluppin er einasta slupp hetlendinga

Kunngerð um ferðslu á Ólavsøku 2000

Ólavsøkuaftan og Ólavsøkudag 28. og 29. juli frá kl. 14.00 til næsta morgun kl. 08.00 verða hesar broytingar í ferðsluni:

Bilferðsla er **ikki** loyvd, eftir **Kopargøtu, á Áarvegnum og niðan á Vaglið, í N. Finsensgøtu frá Vaglinum og niðan til AUTO ella í Mylnugøtu.** Parkering er heldur ikki loyvd á hesum økjum.

Vanlig bilferðsla er **ikki** loyvd tvørtur um **Niels Finsensgøtu á vegamótinum Bøkjarabrekka/Steinatún**, undantikin eru hýruvognar og Buss- og Bygdaleiðir. Um hetta vegamót gongur støðugt nógv fólk, tí má koyrast við størsta varsemi.

Í Niels Winthersgøtu, í Steinatúni og í Bøkjarabrekku er loyvt hýruvognum at søkja hýru.

Meðan kappróðurin fer fram Ólavsøkuaftan, er **Eystara Bryggja stongd frá Kongabrúnni til Jónas Broncksgøtu** fyri vanligari bilferðslu frá kl. 15.00 til kl. 19.00.

Á parkeringsøkinum á Bursatanga er ikki loyvt at parkera frá 27. juli kl. 20.00 til 29. juli kl. 09.00.

Ólavsøkudag, millum kl. 10.00 og kl. 14.00, verður øll ferðsla um **Vaglið** órógvað og rokn-ast kann við, at ikki er gjørligt hesa tíðina at koyra eftir Mylnugøtu, Áarvegnum um Vaglið v.m. vegna skrúðgongu úr Føroya Løgtingi í Dómkirkjuna og aftur.

Tórshavn, hin 24. juli 2000
Petur Poulsen
vicepolitikommisserur

NÝGGJ FLØGA

"Malan"

við Maluni Eyðunsdóttir

SMS · Tel 353535 · Fax 353536
E-mail: tryarin@post.olivant.fo

Vinarliga send mær:

_____ eintøk av "Malan", á kr. 159.-

Navn: __________

Búst.: __________

Útfyll lepan, klipp hann út og send hann til: ***3-arin, Postboks 1057, 110 Tórshavn***

FLØGUDEILDIN

Útimøti

v/ Tórundi, Jaspuri o.fl.

verður í gonguгøtuni uttan fyri Sparikassan hósdagin 27/7, ólavsøkudag 29/7 og sunnudagin 30/7 frá kl. 18 til 19.

Eysturoyar Gongufelag/ kunningarstova

Gongutúrurin sunnudagin er útsettur til 06.08.2000 – Góða ólavsøku.

Politistur

Eitt arbeiði við avbjóðingum

Politiið er eitt av stóru arbeiðsplássunum í Føroyum. Her hevur tú møguleikan í fullan mun at brúka tínar fakligu royndir og tínar persónligu eginleikar í einum sjálvstøðugum arbeiði við nógvum avbjóðingum og møguleikum at mennast.

Høvuðsuppgávan hjá politinum er:

- At vera sjónligt og skapa tryggleika og trygd fyri borgaran og samfelagið
- At fyribygja, at ósemjur, ófriður og kriminalitetur íkemur
- At fara eftir, kanna og uppklára framdan kriminalitet
- At tryggja, at galdandi reglur vera hildnar og fyribyrgja, at vanlukkur henda

Politiið hevur til dømis ein høvuðsleiklut í arbeiðinum at fyribyrgja kriminalitet – ikki minst millum børn og ung.

Grundarlagið fyri politiarbeiðinum er virðingin fyri rættartrygdini hjá borgaranum.

Eitt arbeiði allan sólarringin

Arbeiðið hjá politinum verður gjørt í tøttum samstarvi í politistaliðnum millum einstøku politistarnar og politistøðirnar.

Her er eitt gott samanhald, og arbeiðið byggir á kunnleika til og nýtslu av førleikanum hjá einstaka politistinum fyri at røkka felags málum. Sum politistur ert tú altíð ein partur av liðnum – um tú ert til arbeiðis ella um tú hevur frí. Atlitið til borgaran og samfelagið er allatíðina í miðdeplinum, og tú veitst ongantíð frammanundan, hvat dagurin ella náttin bjóðar.

Løn og útbúgving

Longu frá fyrsta degi sum politistur í royndartíð fært tú eina kappingarføra løn. Harafturat fært tú pensión og ymisk ískoyti fyri tænastu á skiftandi tíðum. Royndartíðin er 3 ár. Aftaná tað fært tú – um tú ert egnaður til politiarbeiðið– fast starv sum politistur.

Menning og karriera

Sum politistur hevur tú góðar møguleikar fyri eini karrieru. Politiið hevur eina røð av serskeiðum – og so eru eisini leiðaraskeiðini fyri politistar, sum hava hug at arbeiða við leiðslu. Harafturat er stór trygd í starvinum og møguleikar at fáa arbeiði innan ymsar deildir ella aðra staðni í landinum.

Ynskir tú at vera við?

Vit seta eingi formlig krøv um útbúgving ella lívsroyndir fyri at søkja starv hjá politinum. Men vit leggja dent á tínar fyritreytir at verða ein góður politistur, sum kann loysa uppgávurnar hjá politinum í samsvar við reglur og virðir í samfelaganum og við virðing fyri einstaka persóninum og rættindum hansara.

Vit vilja fegin seta fólk í starv, sum ymisliga umboða føroyingin við atliti til sosialt og mentunarligt støði – og vit ynskja eitt hóskandi býti millum kvinnur og menn.

Treytir sum skulu vera loknar, áðrenn tú søkir:

- Tú ert fyltur 21 ár
- Tú hevur føroyskan/danskan heimarætt
- Tú hevur góða heilsu, vanliga hoyrn og vanliga litsjón
- Tú hevur koyrikort til persónbil

Meira kunning

Tey, ið ynskja meira at vita, kunnu venda sær til politistøðina á staðnum, ella politistøðina í Tórshavn, at fáa vegleiðing, spurningar svaraðar og kunningartilfar útflýggjað ella sent.

Føroya Landfúti
Politistøðin
Jónas Broncksgøta 17
Boks 3018
FO-110 Tórshavn
Tlf. 31 14 48 Fax 31 82 66
Heimasíða: www.politi.fo

Umsóknir kunnu sendast inn alt árið, og verða upptøkuroyndir eftir tørvi. 4 politistar verða settir í 2001. Umsóknarfreistin til hesar upptøkuroyndirnar er 15. september 2000.